**Framløga um fátækramark á Háskúlanum 24. mars 2014**

Eg vil takka tykkum fyri, at tit taka evnið um fátækradømi upp.

Tað er ikki so nógv fokus á fátækradømi í Føroyum... ella eg vil siga, at tað er ikki nóg nógv fokus á fátækradømi í Føroyum. Í sambandi við jólini er sjálvandi nógv uppmerksemi í sambandi við átøkini hjá Í menniskjum góður tokki, men fátækradømi ger ikki einans um seg um høgtíðina.

At vit hava borgarar í Føroyum, sum dagliga uppliva fátækradømi er ikki nøktandi, og vit mugu tí blíva betur til at hjálpa hesum fólkum, sum hava tað ringast.

Tað er ikki einans av stoltleika, at vit í Føroyum ikki ynskja at hava borgarar, sum liva í fátækradømi - øll gransking staðfestir, at fátækradømi hevur eina langa røð av neiligum avleiðingum fyri samfelagið alt.

Tað vil siga, at umframt vælferð hins einstaka, so er tað ein long røð av neiligum fíggjarligum avleiðingum fyri samfelagið, sum fylgja við fátækradømi. Fremsta stavnhaldið hjá okkum sum myndugleiki má tí vera at fáa fólk úr fátækradøminum.

Vit hava sum kunnugt nú fingið handað eitt álit um fátækramark. Útgangsstøði fyri álitinum er ein løgtingssamtykt frá 2011, sum eg sum landsstýriskvinna í almannamálum havi lagt dent á at fremja í verki. T.v.s., at vit skulu hava eitt føroyskt fátækramark. Eitt fátækramark skal vera eitt amboð í stremban okkara eftir at berja niður fátækradømi í Føroyum.

Tað sum hevur størst týdning av øllum í sambandi við eitt fátækramark, er, at tað er ein fólkslig og ikki minst ein politisk undirtøka fyri markinum.

- Tað hevur í fyrsta lagi týdning, at fátækramark verður viðurkent sum amboð
- Í øðrum lagi, at vit semjast um háttin, sum liggur til grund fyri fátækramarkinum
- Og í triðja lagi, at fátækramarkið liggur á einum støði, har flest av okkum kenna okkum aftur, og sum vit á ein ella annan hátt kunnu standa inni fyri.

Hetta síðsta av hesum trimum er kanska tað lættasta at diskuterað og at broyta – tað sum er mest ítøkiligt.

Spurningurin um fátækradømi er nevniliga á ongan hátt einfaldur; tí fyrst og fremst kann mann spyrja: hvat er fátækradømi? Tað eru nógvar ymiskar fatanir av, hvussu fátækradømi skal skiljast, og hvussu fátækradømi kann avmarkast og bólkast.

Tað er ongin fasitlisti yvir, hvussu fátækradømi kann og skal definerast. Heldur ikki innanfyri granskingarverðina, hóast tað í altjóða høpi hevur verið granskað í hesum í nógv áratíggju. Tað er í ein ávísan mun ein politiskur spurningur heldur enn ein spurningur um serfrøði ella gransking, at definera nær ein persónur ella ein familja kann definerast sum fátøk.

Og hvussu skal so eitt fátækramark knýtast saman við spurninginum um fátækradømi, og hvussu skal eitt fátækramark brúkast í sambandi við stremban okkara at minka um fátækradømi?

Jú – fátækramark verður nógv umrøtt aðrastaðni, og tað eru granskarar og serfrøðingar og sjálvandi eisini politikarar, sum hava meiningar fyri og ímóti. Og kanningar verða gjørdar í ymsum sambondum og við ymsum fátækramørkum.

At áseta eitt fátækramark er ein størri avbjóðing, enn nógv av okkum høvdu ímyndað okkum frammanundan arbeiðið fór í gongd, tí hetta hevur við sær nógvar truplar spurningar. Spurningurin um fátækradømi í Føroyum og spurningurin um eitt føroyskt fátækramark hevur í fleiri umførum verið frammi seinnu árini, og tað hevur verið eitt rættiliga breitt ynski um, at vit skulu hava eitt føroyskt fátækramark.

Og eg havi, sum sagt, nú fingið handað hetta álitið um eitt føroyskt fátækramark, og tað er nú í kvøld fallið í mín lut at greiða frá innihaldinum og teimum tilmælum, sum arbeiðsbólkurin er komin fram til.

Fyrsta avbjóðingin hjá arbeiðsbólkinum var at gera teirra egnu allýsing av fátækradømi. Tað er ein fortreyt fyri at kunna arbeiða við evninum, at mann í arbeiðsbólkinum hevur eina felags fatan av, hvat fátækradømi er.

Slide 1: Allýsingin

*(At vera varandi avmarkaður frá at liva eitt lív við teimum materiellu ressursunum, sum eru í tráð við alment aksepterað livikor og lívshátt og ikki hava møguleika fyri sjálvur at koma sær úr støðuni.)*

Allýsingin leggur upp til eitt relativt forstáilsi av fátækradømi. Tað, at eitt húski ella ein persónur óvilja hevur verri livikor enn onnur, sum liva í sama samfelag, er at vera fátækur.

Allýsingin hevur við sær, at mann eitt nú hevur definerað lesandi úr bólkinum av fátøkum. At vera lesandi er vanliga ein sjálvvald støða, sum væntandi broytist, tá lesnaðurin er liðugur. Eisini eru nøkur, sum hava valt ein øðrvísi og alternativan lívsstíl, har tað at hava eina støðuga inntøku ikki er tað grundleggjandi í tilveruni. Hesi eru eisini defineraði út, tí allýsingin sigur, at tað ikki skal vera gjørligt sjálvur at koma úr støðuni.

Slide 2: Hvussu kann fátækradømi mátast?

Tað eru ikki 50 ella 100 ymiskir hættir av fátækramarki. Tað eru 3 – og bara 3 ymiskir “høvuðs”hættir, sum verða umrøddir í sambandi við fátækramark (við hvør sær smærri tillagingum).

Allir hesir 3 hættirnir hava sínar styrkir og eisini sínar avmarkingar. Tað er ikki ein háttur, sum á ein objektivan hátt kann eyðmerkja øll fátøk (tá vit snakka um eitt mark). Og tað finst ongin semja um, hvør av hesum trimum hættunum er tann optimali ella besti hátturin. Teir 3 hættirnir eru:

1. Inntøkuhátturin – Ein hagstova finnur tað mittastu húskisinntøkuna í landinum aftaná skatt og gjøld. Eitt fátækramark kann so vera ein prosentsatsur av hesi mittastu inntøkuni. Tað, sum vanliga verður brúkt, er antin 60- ella 50 % av tí mittastu inntøkuni. Og tey, sum hava eina inntøku, sum er lægri, eru undir markinum. Hátturin sigur í grundini onki um, um tað er gjørligt at liva á einum nøktandi støði fyri hesa upphæddina, sum nú einaferð er eitt mark. Hetta er eitt statistiskt mát við teimum styrkjum og vansum, sum hartil hoyra. Hetta er hátturin, sum

altjóða er mest viðurkendur, og sum verður mest brúktur til samanberingar millum lond. Í teimum londunum, sum arbeiðsbólkurin hevur kannað fátækramørk, er tað hesin hátturin, sum er grundarsteinurin í almenna fátækramarkinum.

2. Búsketthátturin – talan er um eina "kurv" av vørum og tænastum. Og tað, sum tað kostar, sum er í kurvini – tað er fátækramarkið. Vansin er, at tað altíð vil vera ein subjektiv meting, hvat skal takast við og ikki takast við. Tú finnur neyvan tvey fólk, sum hava sama tørv. Nøkur eta nógv - onnur lítið, nøkur brúka brillur, og onnur hoyritól, nøkur hava ikki tørv á hársjampo og frisør, fyri nøkur er tað ein treyt fyri einum sámiligum lívi at hava bil, og ikki fyri onnur. Og so er tað bústaðarútreiðslan. Tað er so sera stórur munur at hava niðurgoldin hús og so vera nýggjur á bústaðarmarknaðinum. Tað er munur á at búgva í Havn, Sumba, Skúvoy og Klaksvík.

3. Saknhátturin – her er talan um lutfalsliga víðfevndar spurnakanningar (eitt slag av livikorskanning), har borgarar vera spurdir um ymisk viðurskifti, sum tey mangla/sakna í gerandisdegnum vegna vantandi fíggjarligan mátt. Londini í ES og londini í evropeiska búskaparliga samstarvinum gera hesa kanningar – tað er álagt teimum at rapportera hesi hagtølini til evropeiska hagtalsstovnin Eurostat. Arbeiðsbólkurin vísir á, at um so er, at mann ynskir betri vitanargrundarlag um fátækradømi í Føroyum, so er tað hesi hagtølini, sum skulu fáast til vega. Men hinvegin, so er talan um ressursukrevjandi kanningar. Hagstovan upplýsir, at um so er, at vit skulu gera kanningarnar, og tær skulu liva upp til metodisku krøvini, so skulu vit í stødd og ressursum nærkast okkum tí, sum verður gjørt í Íslandi, og har brúkar mann 4 ársverk til hetta.

<u>Fátækramark í øðrum londum</u>
Hvussu gera tey so í øðrum londum?

Tað er líkamikið, hvar tú hyggur út í verðina í sambandi við fátækramarkskjak, so er tað markið sum eitt amboð, sum verður diskuterað av fakfólki – fyri ímóti og hvat slag av fátækramarki. Tí markið í sær sjálvum er eitt samansett kompliserað amboð, sum mann í flest øllum londum hevur trupult við at semjast um.

At hava eitt alment fátækramark er sostatt ikki vanligt. Londini gera hvør í sínum lag átøk at fyribyrgja fátækradømi, men átøkini vera í høvuðsheitum ikki knýtt at einum marki. Tað vil so eisini siga, at vit eiga ikki at hava eina fatan av, at vit í Føroyum hava verið eftirbátar, tí vit ikki hava havt eitt fátækramark.

Danmark er einasta norðurlandi, sum hevur eitt alment fátækramark, og Danmark hevur bara havt tað í 8-9 mánaðir. Annars eru bara heilt fá OECD-lond, sum hava alment fátækramark. Álitið tekur fram Írland og Stórabretland, sum hava fátækramark. Í hesum londum er tað tann hagfrøðisligi hátturin, sum er grundarsteinurin undir fátækramarkinum – nevniliga inntøkuhátturin. Danmark er ikki komið longri enn at definera fátækramarkið – hvussu tað skal brúkast er ikki støða tikin til enn, og vit kunnu eisini staðfesta, at tað í Danmark enn ikki verður brúkt til so øgiliga nógv.

Men fátækramark verður nógv diskutera í øllum londum, og tað eru eisini kommunur, granskarar, hagstovur og felagsskapir, sum hvør í sínum lagi arbeiða við ymsum fátækramørkum, men fátækramørkini vera ikki frá almennari síðu viðurkend, sum eitt mark, sum allir borgarar skulu lyftast upp um. Tað er onki land, sum hevur eitt fátækramark, sum gevur borgarunum ein rætt mótvegis myndugleikunum – t.d. ein rætt til eina peningaveiting.

Nøkur lond brúka búsketthættin í sambandi við ásetan av teimum lægstu veitingunum á sosiala økinum. T.d. Svøríki brúkar hendan háttin, har svenska stovnurin Konsumentverket á hvørjum ári roknar sokallaða Riksnormen, sum liggur til grund fyri Ekonomisk bistånd. Upphæddin er sæð við okkara eygum ógvuliga lág, og tað hava eisini í Svøríki verið nógvar atfinningar ímóti hesi lágu veitingini (3.300 kr. um mánaðin til ein vaksnan persón + bústað).

Tað føroyska fátækramarkið

Arbeiðsbólkurin hevur so valt, at tað føroyska fátækramarkið skal grundast á inntøkuháttin.

Slide 3 Føroyska fátækramarkið

*("Tey, sum 3 ár á rað hava havt inntøku lægri enn 60 prosent av miðinntøkuni, eru undir fátækramarkinum")*

Hatta er so tað, sum arbeiðsbólkurin mælir til skal vera tað føroyska fátækramark. Tey, sum hava inntøku, sum er lægri enn 60 % av miðinntøkuni og hava havt tað í 3 ár.

Gransking vísir, at tað serliga er langtíðarfátækradømi, sum hevur langskygdar avleiðingar fyri tann einstaka. Tað ikki at kunna hava kor, sum vit meta vera sámilig í t.d. 1½ ár, er ikki tað, sum vit javnseta við at vera fátøk.

Sjálvandi er tað, ikki at hava til absoluttan tørv, tvs. at kunna eta seg mettan, tað er altíð veruligt fátækradømi, og skal til einhvørja tíð fyribyrgjast. Men í hesum føri snakka vit um tað, sum er sámiligt samanborið við onnur.

Arbeiðsbólkurin ger vart við, at tá tað kemur til børn, so kann sjálvt stutttíðarfátækradømi fáa meira álvarsligar avleiðingar seinni í lívinum, og tí eigur mann altíð at leggja dent á, at so fá børn sum gjørligt sjálvt í stutta tíð eru undir markinum.

At hesin hátturin er valdur framum hinar – tað er kanska ikki heilt rætt at siga, tí búsketthátturin verður brúktur til at stuðla undir tí valda fátækramarkinum, og tað er serliga búsketthátturin, sum hevur við sær at arbeiðsbólkurin hevur valt 60 % og ikki 50 % sum mark (sum er tað, sum hini norðurlondini í høvuðsheitum taka fram og viðgera í sambandi við hagtøl um fátøk).

T.v.s. at arbeiðsbólkurin hevur eisini gjørt eina kanning av, hvat skal til fyri at liva eitt sámiligt lív. Men slíkar kanningar hava so nógv fyrivarni, at arbeiðsbólkurin metir háttin ikki vera egnaðan, sum høvuðsgrundarlag undir einum fátækramarkið. Harumframt leggur arbeiðsbólkurin eisini dent á, at búskettið "bara" er teirra egna subjektiva meting av einum sámiligum lívi.

Og so er tað saknhátturin, har arbeiðsbólkurin eisini sigur, at tað gevur eitt dyggari grundarlag undir vitanini um fátækradømi og arbeiðinum at taka burtur fátækradømi.

Slide 4 – talvan við upphæddum

Talvan vísir upphæddir (eftir skatt og gjøld), sum eru tað føroyska fátækramarkið. Upphæddin svarar til 60 % av miðinntøkuni. Danmark brúkar 50% av miðinntøkuni sum fátækramark, og tað danska fátækramarkið er sostatt eisini lægri. Tað sampakkar eisini við ábendingarnar um, at kostnaðarstøðið á nøkrum økjum er hægri í Føroyum enn í øðrum londum.

Slide 5 – upphæddir eftir búsketthháttinum

Tað hevur týdning at leggja til merkis, at búskettupphæddirnar eru uttan bústaðarútreiðslur.

Sum tit síggja, so er ein munur millum búsketthháttin og inntøkuháttin, og tað metir arbeiðsbólkurin vera neyðugt, tí sum nevnt eru bústaðarútreiðslurnar ikki við í búskettupphháttinum.

**Hvørji eru tey fátøku?**

Endamálið við álitinum er ikki beinleiðis at siga, hvussu nógv fátøk vit hava í Føroyum, og tað ber sambært arbeiðsbólkinum heldur ikki til siga tað heilt neyvt. Hagstovan ger hagtøl um fólk og húski, sum í 3 ár á rað hava havt inntøku lægri enn 60 % av miðinntøkuni, men har eru nøkur fyrivarni, sum skulu greinast nærri fyri at kunna siga heilt neyvt, hvør er fátækur. Men hóast tað hevur arbeiðsbólkurin 3 høvuðsniðurstøður, sum vit kunnu taka fram.

Slide 7 Hvør er fátækur

Stakir uppihaldarar hava nógv tær lægstu inntøkurnar. T.v.s. eisini siga, at børn eru yvirumboðaði í hagtølunum (og eru tey faktiskt tað í øllum londum).

Í øllum øðrum londum er tað soleiðis, at tey, sum eru uttanfyri arbeiðsmarknaðin, eru fátøk ella undir einum fátækramarki. T.v.s. er tú á eini sosialari veiting fellur tú av tær sjálvum undir markið. Hetta er eisini galdandi í Føroyum, men tó í minni mun enn í øðrum londum. Orsøkin er, at í Føroyum er munurin millum sosialar veitingar og løn minni enn í øðrum londum. Fleiri av sosialu veitingunum eru hægri enn fátækramarkið. Men ikki allar. Og vit skulu

eisini hava í huga, at t.d. í ALS, er tað ein týðandi partur, sum fær ein sats, sum er lægri enn hámarkið.

Vit kunnu somuleiðis siga, at føroyingar hava heimsmet í at arbeiða niðursetta tíð. Og tá mann arbeiðir niðursetta tíð, hevur mann eisini lágar inntøkur og eisini inntøkur, sum eru lægri enn fleiri av sosialu veitingunum.

Og arbeiðsbólkurin staðfestir, at fólkapensjónistar í høvuðsheitum ikki eru fátækir. Arbeiðsbólkurin hevur valt at taka fólkapensjónistarnar við – partvíst tí tey eru yvirumboðaði í hagtølunum, og tí fólkapensjónistar vanliga verða tiknir fram sum ein veikur bólkur í samfelagnum. Sjálvandi hava vit eisini fátækar fólkapensjónistar, men bólkurin er munandi meira avmarkaður enn tann bólkurin, sum vanliga verður sipað til – nevniliga tey, sum bara hava fólkapensjón og samhaldsfasta at liva av. Í álitinum eru annars nokkso drúgvar grundgevingar fyri hesi niðurstøðuni, og skal eg tí vísa til álitið í tí sambandi.

## **Hvat kann eitt fátækramark brúkast til?**

Eitt fátækramark ger onki í sær sjálvum. Avbjóðingin er at lyfta øll tey upp um, sum tørva tað – og fyrst og fremst tey, sum tørva tað mest. Arbeiðsbólkurin sigur, at markið eigur ikki at brúkast til at lóggeva fólk upp um. Soleiðis verður tað ikki brúkt nakra staðni og er ikki egnað til tað. T.v.s. at markið eigur í sær sjálvum ikki at geva borgarum nøkur rættindini.

Men um so er, at mann ynskir at minka um fátækradømi (og tað meini eg veruliga at vit eiga at leggja nógva orku í), so er hetta eitt amboð, sum kann fáa týdning í tí sambandi. Vit hava longu frammanundan hagtøl við fólkum, sum eru undir einum 60%-markinum, men vit hava nú fingið eitt kvalifiserað boð upp á, hvussu hetta skal brúkast (og ikki brúkast). Vit hava fingið eitt boð upp á, hvussu vit kunnu styrkja grundarlagið undir teimum tølunum, sum verða framleidd.

Vera tilmælini fylgd um m.a. at nágreina inntøkukeldu hjá teimum, sum eru undir markinum, og evt. við at gera kanningar eftir saknháttinum, so fáa vit eisini at vita precist, hvørji tey eru, sum eru undir markinum. Og hetta er neyðug vitan um mann skal arbeiða málrættað við at hjálpa teimum, sum eru

ringast fyri. Alternativið er, at mann brúkar ressursir skeivt, og at tað ikki neyðturviliga eru tey, sum hava størst tørv á tí, sum átøkini verða rætta ímóti.

Vit eiga at seta okkum nøkur ítøkilig mál um at minka um fátækradømi, og eitt neyvari fátækramark er ein fortreyt fyri, at tað er gjørligt at arbeiða meira málrættað og hjálpa teimum, sum eru ringast fyri her í samfelagnum, og tað er ikki fyrr enn vit hava eitt neyvt mátiamboð, at tað ber til at fylgja upp uppá um málini verða nádd.